Bjørt Samuelsen **Nr. 34/2020**
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52 a

Fyrispurningur um mvg-endurrindan til hitapumpur og elbilar, settur landsstýrismanninum við fíggjarmálum Jørgeni Niclasen (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

1. Ætlar landsstýrismaðurin at leingja skipanirnar við mvg-endurrindan til elriknar hitapumpuskipanir og til el- og vetnisbilar?
2. Umhugsar landsstýrismaðurin at víðka mvg-afturberingina til sólorku og aðrar eins góðar og góðkendar grønar hitaskipanir?
3. Um landsstýrismaðurin ikki ætlar at leingja mvg-afturberingina, hevur hann so aðrar ætlanir, sum kunnu eggja til og skunda undir, at húsarhald og vinna gera íløgu í grønar hitaskipanir, og leggja um til grøna orku til upphiting og flutning?

Viðmerkingar:
Skipanirnar við endurrindan av mvg fyri íløgur í hitapumpuskipanir og elbil ganga út 31.12.2020.
Tað hevur verið eitt felags politiskt mál at arbeiða fyri, at Føroyar kunnu gerast 100% grønar á landi í 2030. Týðandi táttur í hesi stremban er at fáa upphiting og ferðslu á landi lagdar um til grøna orku.
Mvg-afturberingin fyri gjørdar íløgur í hitapumpur til at hita sethús og í elbilar er ein týdningarmikil lutur, tí fíggjarligar "gularøtur" ofta virka væl.
Undanfarna samgonga innførdi hesar og aðrar skipanir fyri at fáa sett størri ferð á grønu umleggingina. Eisini vektgjaldskipanin fyri elbilar varð umløgd, so hon gevur fyrimun til bilar, sum hava minst CO2 útlát og harvið dálka minst.
Tað tekur altíð tíð, áðrenn verulig gongd kemur á, og nú tað sær út til at átøkini eru farin av virka, og størri ferð er komin á umleggingina, kann tað vera skilagott at leingja afturberingarskipanirnar í nøkur fá ár afturat. Í løgtingsmáli nr. 27/2019 frá Tjóðveldi og Javnaðarflokkinum varð skotið upp at leingja afturgjaldsskipanirnar til 2024 og víðka hesa til sólorkuskipanir og møguliga aðrar eins dyggar og góðkendar hitaskipanir.
Tað hevur alla tíðina verið ætlanin, at tíðaravmarking skal vera á mvg-afturberingini, tí fyrr ella seinni má roknast við, at kappingin millum veitarar av grønum hitaskipanum og elbilum virkar so mikið væl, at prísirnir koma niður á eitt rímiligari og kappingarført støði. Í løtuni sær tó út til, at tað rætta er at leingja afturberingarskipanirnar eina tíð afturat.
Sum skilst er áhugin at gera íløgu í grøna orkuskipan nógv vaksin, og bíðirøðir eru at fáa borað hol til jarðhitaskipanir. Ein steðgur í mvg-afturberingini nú kann fara at bremsa jaligu gongdini.

Á Løgtingi, 26. oktobur 2020

Bjørt Samulesen